DAGSINS MEINING

Óheppin samanblanding

Undir orðaskiftinum um løgmansrøðuna fekk spurningurin um útlegging av umsorganini fyri teimum gomlu stóra umrøðu. Hetta er ikki annað enn rímuligt, eftirsum talan er um eitt sera stórt og álvarsamt mál. Spurningurin, sum við einum løgnum heitið verður nevndur »eldraøkið«, var umrøddur við atliti at útlegging og økismenning.

Tað snýr seg um at flyta umsitingina av eldraumsorganini út til kommunurnar eins og gjørt var við barnaansingini. Henda flyting eydnaðist eftir øllum at dømu væl, og tí eigur tað sama at verða gjørt við hetta, sum nú nevnist eldarøkið, sigur landsstýrið. Ikki allir tingmenn tóku treytaleyst undir við hesi ætlan, og eigur landsstýrið tí at lurta eftir hesum røddum og hugsa seg væl um, áðrenn endaliga avgerðin verður tikin. Talan er um eitt nógv størri og nógv tyngri øki enn barnaansingin. Nógvar kommunur eru smáar. Sjálvt um hesar smáu kommunurnar taka seg saman í felagsskapir ella beinleiðis leggja saman, so verða hesar eindir í smærra lagi til at umsita eitt so stórt øki.

Støðan er jú tann, at spurningurin um uppihaldið av teimum eldru verður ein tann størsti samfelagsspurningurin í framtíðini. Sum samfelagsgongdin er, gerast alt fleiri gomul, samstundis sum tað verða alt færri vinnuvirkin fólk at forsyrgja hesum skjótt vaksandi skara av gomlum. Er tað undir hesum umstøðum rætt at leggja hetta mál út og spjaða kreftirnar, kann við góðum grundum verða spurt. Rættast man vera at kanna hetta mál væl og virðiliga og ikki at loypa framav. Tískil er 1.januar 2005 í so tíðliga at fremja eina so stóra broyting.

Síðan er tað spurningurin um útlegging av eldraøkinum sum liður í økismenning. Spurningurin er, um ikki hetta er ein óheppin samanblanding av viðurskiftum, um ikki eiga at verða blandað saman. Tað virkar, sum ein manglar nakað at hava alt tosið um økismenningina í, og so verða hesi viðurskifti blandað saman. Hetta mátti verið ein ov álvarsamur spurningur at nýta í taktiskum spæli, soleiðis sum gjørt varð undir orðaskiftinum um løgmansrøðuna. Okkara gomlu, sum við tógvi stríð hava byggt hetta samfelagið upp hava annað og betri uppiborðið.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ólavsøkusangurin

Tann sum ferðast millum vanliga fólkið veit hvat tey hildu um Ólavsøkusangin í ár!

Heri Simonsen

»Ólavsøkusangurin hevur verið góður síðstu árini, men ikki í ár!«, »Ólavsøkusangurin í ár varð eitt vónbrot!«, »Næstan eingin av teimum løttu sangunum, ið skapa »stemning« (so sum »Sildavalsurin«, »Í góðum veðri« o.l.) blivu sungnir!« ...hesar vóru nakrar av viðmerkinginum frá vanliga fólkinum.

Onkur segði enntá: »Ólavsøkusangurin í ár varð so vánaligur, at eg rýmdi!«. Ein fyrimun hevur man so, sum postmaður. Man ferðast millum vanliga fólkið, og gerst væl vitandi hvat tey halda um ymisk mál, eisini Ólavsøkusangin 2003. Og skal eg gera eitt skjótt »Gallup«, so vóru 29 av hvørjum 30 persónum, sum umræddu Ólavsøkusangin misnøgd við sangúrvalið í 2003. Vanliga fólkið hevur sæð uppá Ólavsøkusangin, sum ein góðan sið/tradisjón, har vit saman við Frelsunnarherinum og hornorkestri teirra (á hvørjari Ólavsøka!) syngja »Tíðin rennur« og tjóðsangin, áðrenn onnur (annar?) tekur yvir. Og vanliga fólkið, sum eg ferðist ímillum meinar eisini, at felagssangurin gekk best teir tveir sangirnar vit sungu saman við Frelsunnarherinum, sjálvt um hesir eru ein afturvendandi standardtradisjón á hvørjari Ólavsøku! Vanliga fólkið hevur sæð uppá Ólavsøkusangin, sum eina góða, kenda og fjálga tradisjón! Men nú óttast vanliga fólkið, at Ólavsøkusangurin heldur skal gerast profilering av ókendum sangum, sum tey ikki kenna, tíansheldur duga at syngja! Og so er skjótt, at tey 12.000 gerast 120. So segði vanliga fólkið við postmannin seinast í juli og fyrst í august-mánað 2003, og hann bar bara hjartasuffið víðari í bløðini. Og nú gleðast vit um, at Ólavsøkusangurin ár 2000 finst á fløgu, eitt dýrabart minnið um eina (kanska?) farna tíð!

Tí í hjørtum okkara býr frælsi...

Svenning Borg, Vágur

Victoria kann ikki eita Victoria, men skal eita Viktoria.

Tann heilaga klanin hevur talað, persónliga frælsi er tikið frá føroyinginum og verður nú umsitið av einum almennum stovni, sum í mínum hugaheimi hevur steriliserað føroyska málið, og eigur tí føroya løgting at taka føroysku navnalógvuna upp til nýggja viðgerð, og at fáa staðfest, hvør í eigur navni hjá barninum, foreldrini ella sterili stovnur landsins, tað er tað, sum tað snýr seg um, við c elle uttan c, persónliga frælsi er vekk, yvirformyndarfi tekur yvir, og so heldur alt áfram.

Foreldrini eiga navni hjá barninum, og má og skal tað vera teirra avgerð,um navni skal stavast við c ella ikki, tað haldi eg, at flestu føroyingar eru samdir um, nøvn sum eru brúkt í yvir hundrað ár, mugu og skulu kunnu brúkast framyvir, annað eigur ikki at koma uppá tal.

Fay Weldon í Bókasøluni

Tað verður helst trongligt, tá heimskendi rithøvundurin Fay Weldon, ið m.a. skrivaði »Upstairs, downstairs«, fer at signera bøkur í Bókasøluni

TÍÐINDASKRIV
frá SMS

Hon kom nú bara væl undan, tá hugsað verður um, at hon varð fødd í Onglandi, hóast ætlanin var, at hon skuldi verða fødd í Ný Sælandi, at hon varð doypt Franklin Birkenshaw, tí mamman trúði upp á numerologi, at foreldrini vórðu skild tá hon var fimm, og hon vaks upp í teirri trúgv, at heimurin var mannaður við kvinnum. Hon varð loksins útbúgvin innan figgjar- og sálarfrøði. Fyrst í tjúgunum var hon í heilt stutta tíð gift við einum nógv eldri manni. Óvist er, um fyrsti sonurin er sonur henda mann, ella um hann var gitin frammanundan. Men hon aldi sonin einsamøll. Hon arbeiddi fyrifallandi arbeiði á Daily Mirror og í uttanríkisráðnum og fór síðani at arbeiða við reklamu. Í 1962 varð hon gift við Mr. Weldon og fekk tríggjar synir aftrat.

Tað var tá, hon segði við seg sjálva: »Eg eri tretivu, røkki ikki til, eri kedd av tí og óvitandi – og eg veit tað!« So til psykoanalysu. Og so at skriva – fyrsta bókin, »The Fat Woman's Joke«, kom í 1967, men tá hevði hon longu skrivað um hálvthundrað hoyrispøl og sjónleikir til sjónvarp. Tað kendasta var helst »Upstairs, downstairs«!

Næstu 30 árini skrivaði hon. Eina rúgvu. Hon er týdd til eitt ótal av tungumálum, eisini føroyskt, tað syrgdi júst Bókasølan fyri við bókini »Joanna og klovningar hennara«.

Hon skildist frá Weldon, men ber framvegis hansara navn, hóast hon nú er gift við Nick Fox, ið er yrkjari. Fay Weldon verður í Føroyum í sambandi við Listastevnuna í Norðurlandahúsinum. Men sjálvsagt skal hon eisini vitja í Bókasøluni í SMS. Kári roknar við kaosi, tí Fay er so væl umtókt í Føroyum, at samanlagt seinastu árini er hon millum allarbest umtóktu høvundarnar, og lesaraskarðin í Føroyum veksur sera skjótt.

Fay fer at vitja og signera bøkur í Bókasøluni mánadagin 11. august kl. 16.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fríi. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Eru Føroyar ein hóttan móti heimsfirðinum?

Helgi Abrahamsen

Umboð fyri samgonguflokkarnar hava í fjølmiðlunum í summar pástaðið nakrar ferðir, at Danmark hevur spart nógvan pening fyri NATO-støðirnar í Føroyum. Fyrst hevur verið fram, at meðan onnur lond gjalda 3 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni í árligum limagjaldi til NATO, so sleppur Danmark við einum lægri gjaldi.

Og her siga teir seg hava funnið rótina til blokkstuðulin, tí upphæddin sum Danmark sparir hjá NATO, skal vera umleið líka stór, sum samlaði blokkstuðlinum til Føroya og Grønlands. Onkur hevur í hesum sambandi mælt til, at ein figgjarlig uppgerð verður gjørd av hesum viðurskiftunum.

Henda niðurstøðan minnir ikki sørt um eina kanning sum einaferð vísti, at færri børn vórðu fødd í einum landi, eftir at talið av storkum í sama landi var minkað. Niðurstøðan kundi tí bara vera, at tað var storkurin, sum kom við børnunum.

Tað at tvey tøl samsvara í eini kanning, nýtist ikki at merkja tað sama sum, at tey hava nakað sum helst við hvørt annað at gera.

Hvat vilja tey við hesum ?
Eg kann ikki lata vera við at spyrja, hvør ætlanin er við allari hesari skrivingini? Um tað nú vísir seg, at vit sambært eini figgjarligari uppgerð hava fingið ov lítið í blokkstuðli, fer landsstýrið so at krevja at blokkstuðulin (sum teir sjálvir lækkaðu í farna valskeiði) verður hækkaður aftur? Ella hvat um vit hava fingið ov nógv? Fer landsstýrið so at senda pengar aftur til Danmarkar, ella er ætlanin kanska at minka blokkstuðulin uppaftur meira, nú trupult verður at fáa figgjarlógina fyri 2004 at hanga saman ?

Nei endamálið er hvørki at hækka ella lækka blokkstuðulin. Endamálið er at seta kílar í ríkisfelagsskapin, uttan at vilja nakað sum helst.

Gamal brølari
Hetta við NATO-pengunum var annars tann fyrsti stóri brølarin, sum landsstýrið gjørdi undir fullveldissamráðingunum, sum vóru í Keypmannahavn í 2000.

Eina viku undan fyrsta samráðingarfundinum, almannakunngjørdi landsstýrið á tíðindafundi hetta roknistykkið, sum nú verður drigið fram aftur. Við hesum royndi landsstýrið at trýsta stjórnina til at geva teimum eina langa skiftistíð. Men júst henda provokatiónin fekk Nyrup-stjórnina til at gera eitt líka so høpisleyst roknistykki yvir útreiðslur, sum danska stjórnin segði seg hava havt av føroyingum í Danmark. Harvið var støðið undir samráðingunum lagt, og úrslitið kundi ikki gerast øðrvísi enn tað bleiv.

Ætlaðu sjálvir at gerast limir í NATO
Ein partur av fullveldisætlanini hjá landsstýrinum í farna valskeiði, var júst at innlima Føroyar í »Partnership for Peace«, sum er ein undirdeild hjá NATO. Høgni Hoydal, sum er meistari í at venda tingunum á høvdið segði tá, at hetta var neyðugt fyri at tryggja okkara grannum, at vit ikki blivu ein hóttan fyri heimsfriðin.

Flestu limirnir í »Partnership for Peace« eru gamlir limir í Warsawa-samgonguni, sum hava havt ynski um at gerast limir í NATO, eftir at múrurin fall. Men fyri ikki at flyta beinleiðis frá Warsawa – samgonguni og yvir í NATO, so hava hesi verið fyribils »parkeraði« í »Partnership for Peace«. Men málið er alla tíðina, at londini seinni skulu gerast fullgildugir limir í NATO.

Vit mugu eisini gjalda limagjald
Um vit hugsa okkum, at Føroyar sum fullveldi høvdu blivið limir í »Partnership for Peace« – og seinni NATO, so kundi tað léttliga hent at vit (eins og onnur Natolond) eisini sluppu at gjalda tey 3 prosentini av bruttotjóðarúrtøkuni í limagjaldi. Tað vil siga, at um Føroyar við hesum fortreytum høvdu verið fullveldi, og limur í NATO í 2002, so skuldu vit hetta árið rindað heilar 312 mió. krónur (ella líka nógv sum nýggja Suðuroyarskipið kostar) í limagjaldi fyri eitt ár. Hví skrivar eingin um tað? Hví verður bara skrivað um, hvussu nógv Danmark eigur at gjalda? Hví nevnir eingin, at vit sum partur av ríkisfelagsskapinum eru við í NATO, uttan at gjalda eitt oyra í limagjaldi (meðan allir okkara grannar kunnu sova trygt hvørja einastu nátt)?

Síggja ikki útreiðslusíðuna
Eg skal ikki útiloka møguleikan fyri, at Føroyar møguliga kundu fingið eina seravtalu við NATO um limagjaldið. Men so leingi sum eingin avtala er gjørd, er hetta avgjørt eingin sjálvfylgja. Men í hugaheiminum hjá landsstýrinum er hetta eftir øllum at dømu meira enn sjálvfylgja.

Í frágreiðing løgmans um uttanlandsmál 2000-2001 segði løgmaður millum annað: »Tískil hevur tað ongan eyka kostnað við sær fyri NATO, um einar sjálvstøðugar Føroyar gerast limaland.«

Her síggja vit, at meðan nógv hóvasták verður gjørt burturúr, at Danmark møguliga hevur goldið ov lítið í limagjaldi, so tosaði undanfarna landsstýri um, hvussu nógv føroyskur limaskapur vildi kosta fyri NATO. Ikki eitt orð um, hvat limaskapurin vildi kostað fyri Føroyar.

Grannarnir sova trygt, men...
Grannarnir kunnu allir sova trygt hvørja einastu nátt, tí so leingi sum Føroyar eru partur av ríkisfelagsskapinum og harvið NATO, so eru vit (í øllum førum fyribils) eingin hóttan fyri heimsfriðin.

Føroyingar kunnu eisini sova trygt um náttina, tí hóast eingin króna verður játtað til verjuútreiðslur á løgtingsfiggjarlógini, so hava vit gjøgnum ríkisfelagsskapin og NATO kortini eina verju.

Teir einastu sum ikki fáa sovið um náttina eru føroyskir fullveldismenn, sum liggja í andvekri, tí teir ivast í, um Danmark møguliga hevur spart nøkur oyru av ríkisfelagsskapinum. – Og tað má ikki henda.

Stressless

Fólkaflokkurin er við at fáa stress,
alt gjørdi línuskipið Jógvan S.
Anfinn og Jørgin hava einki gjørt,
alíkavæl leikar alt púra ørt.

Embætismenn hava loyvið givið,
skjalið sjálvt er niðurgrivið,
Heini leikar í og er óður,
kanska verður tað seinasti róður.

Endurgjald einki kann nakar fáa,
fullveldið verður burtur máað.
Karstin situr so fast á lokið,
bíðar hann eftir figgjarlógarrokið.

Lisbeth hon er slett ikki býtt,
í løgmansrøðu fann hon einki nýtt.
Sannleikar gamlar í fjølmiðlum bera,
samdir eru um einki at gera.

Jenis og Kári teir fóru at goyggja,
nú meðan onnur fáast við at hoyggja.
Terrin er góður men tó skal valdast,
løgtingsins vilji skal sjálvandi haldast.

Tobbi tevjar í luftini blóð,
Kristina Háfoss hon er eisini óð.
Stumann Hansen í pípuna stappar,
grivnir eru grýtulappar.

Útróðrarmenninir allir og Essa,
lata seg sjálvandi ikki stressa,
men tann sum fæst við stórpolitik,
Guð viti um tað fæst á honum skikk.

Gott summar.

s.

Leiðarin á Dimmu onkisvirður føroysk listafólk

Oddfríður Marni Rasmussen
Formaður í LISA, Listafólkasamband Føroya

Tá ið Listastevna Føroya var í fjør, varð javnan spurt: »Hvat segði Dimman um hetta ella hatta tiltakið?«. Í fjør hevði Dimman ein positivan hugburð til tað, sum fór fram á Listastevnuni, og var hon einasta blaðið, sum megnaði tað. Í ár leggur Dimman út við at ummæla sýningar, sum ikki eru framfórdar enn. Leiðarin í Dimmuni frá 6. august, er ein long niðurgeran av føroyskum listafólki, og sum formaður í LISA (Listafólkasamband Føroya), er tað bæði harmiligt og ikki minst ein stór skomm, at eitt føroysk blað (sjálvt um tað er eitt óheft sambandsblað) skal skriva so niðurlátandi um føroysk listafólk. Tað vil ikki siga, at allir blaðmenninir ella kvinnurnar har, skriva niðurlátandi um føroysk listafólk, nei, tað er hann, sum hevur ábyrgdina av hvørja kós blaðið skal hava.

Orðforarin á leiðaranum, meinar fyri tað fyrsta, at tiltokini á Listastevnu Føroya 2003, eru alt ov dýr, og at tey føroysku listafólkini áttu at verið nógv ódýrari enn hini. Tað er at gera stóran missmun. Tey, sum eru við á Listastevnu Føroya, eru yrkislistafólk og eiga eisini at verða vird sum tað. Tey fáa somu løn sum tey, ið koma við flúgvara ella við skipi aðrastaðnis frá. Fyri at fáa tað niður á eitt støði, sum er skiljandi, so vil hetta siga tað sama sum, at ein fótbóltsdystur eigur at vera dýrari, tí at tveir ella tríggir av leikarunum, eru frá Pólandi ella onkustaðnis úr Afrika, og atgongumerkini til fótbóltsdystir eru anntá leys av MVG-num. Tað eru atgongumerkini til listalig tiltøk ikki.

Aldubáran verður nevnd í leiðaranum. Longri frammi í sama blaði, er grein, sum Beate L. Samuelsen hevur skrivað um Aldubáruna. Har stendur at lesa, at fleiri útlendskir tónleikarar eru við Aldubáruni á hesum sinni. Tónleikararnir eru úr Íslandi og Danmark. Hvussu skulu vit eftir leiðaraskribentinum á Dimmu gera við atgongumerkini til konsertina hjá Aldubáruni? Gjalda hálvan pris? Sig mær lesur blaðstjórin ikki sítt egna blað.

Eitt annað dømi, sum verður drigið fram, er Le Cirque Invisible, har dóttur Charles Chaplin, Victoria Chaplin er við. Hon verður ummælt, ella nærum frámælt áðrenn sýningin hevur verið, bara tí, at hon er dóttir navnframa komikaran Charles Chaplin. Og nú sýningin HEVUR verið, vórðu øll atgongumerkini útseld – atgongumerki, sum í Norra kostaðu yvir 500 krónur, og, sum í Listastevnu Føroya kostaðu 125 krónur fyri børn og 225 krónur fyri tilkomin og at sær komin.

Eisini verður nevnt, at fyrr hevði Norðurlandahúsið tann príspolitik, at onki skuldi kosta meir enn 30 ella 50 krónur. Minnist meg rætt, so var hesin príspolitikkur við til, at onnur stað í Havnini, vórðu noydd at seta sínar prísir niður. Tá varð sera stór ónøgd um hetta.

Fólk vita nú, at á hvørjum ári, er ein Listastevna. Á sama hátt sum tey spara saman til jóla, til aðrar stevnur, so sum Ólavsøku, ella um tey velja at fara niður til Keypmannahavnar at lurta eftir Rolling Stones í Parkini, og gjalda flogferðaseðil, kamar á Hotelli v.m., ber eisini til at spara saman til Listastevnuna.

Um ein so vælskipað og stór stevna, sum Listastevna Føroya skal virða tey, sum geva stevnuni skap og innihald, so mugu hesi fáa løn fyri teirra arbeiði, um so tey eru úr París ella úr Kvívík. Vónandi letur lesarin seg ikki yvirtala av sovorðnum frámælariið, men letur seg heldur stýrast av egnum hugi at síggja okkurt av teimum mongu tiltøkunum, sum eru á Listastevnu Føroya 2003.